# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Havnar leksikon:

# The Faroe Boys



Hetta er tann fyrsta myndin av tí so kenda poppbólkinum The Faroe Boys, sum varð stovnaður í 1962 og gavst í 1967.

Teir fimm sum mannaðu The Faroe Boys í 1962 vóru, f.v.: Bjarni Skaalum, Tummas Juul Askham, Dánjal Petur Djurhuus, Milson Zachariassen og Tummas Nielsen. Hesi seks árini vóru fleiri útskiftingar í bólkinum.

Myndin er rættuliga sjáldsom, tí hon er frá tí tíðini, tá tað var hægsti móti at ganga í føroyskum troyggjum, og helst skuldi troyggjan vera niðri í buksunum, og vanliga vórðu tey kendu beltini við føroyska Merkinum á spenninum brúkt. Beltini vóru úr messingtráði og var bláur, reyður og hvítur tráður drigin ígjøgnum beltið. Hesi føroysku tjóðarbelti vórðu framleidd í Aberdeen. Sum tað sæst á myndini kann tónleikaraútgerðin ikki mátast við tað útgerð, sum brúkt verður í dag.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen í telefon 314647 ella 273168.

*Mynd:*
*Føroya Fornminnissavn*

## Hesi 30 komu víðari

**Eftir upptøkuroyndina vórðu hesi 30 vald út til tey trý undanumførini undan sjálvari finaluni. Millum tey 30 er bert tann eini drongurin**

| | |
|---|---|
| Poulina Øregaard, Klaksvík | (12 ár) |
| Ester Kristiansen, Norðskála | 12 |
| Marita Thomsen, Tvøroyri | 13 |
| Barbara Petersen, Havn | 12 |
| Oddvør E. Dam, Havn | 12 |
| Marin Tórgarð, Havn | 13 |
| Sólvá Jensen, Saltangará | 13 |
| Eva Døgg Bragadóttir, Hvalba | 10 |
| Sharon Zakariassen, Argir | 14 |
| Johanna Niklasen, Havn | 10 |
| Harald S. Hansen, Toftir | 13 |
| Maria Ronnadóttir, Havn | 9 |
| Heidi V. Skorðá, Havn | 9 |
| Ninni Andersen, Toftir | 13 |
| Sanna A. Mortensen, Havn | 13 |
| Jón á Steig, Havn | 10 |
| Páll Brim Jensen, Klaksvík | 12 |
| Kirtin í Garði, Havn | 11 |
| Anna Joensen, Havn | 12 |
| Døgg Durhuus, Argir | 13 |
| Helena H. Jørgensen, Sørvág | 8 |
| Suffía Lind Rasmussen, Klaksvík | 12 |
| Hjørdis Nesá, Toftir | 13 |
| Durita Jógvansdóttir, Klaksvík | 11 |
| Silja Danielsen, Kollafjøður | 10 |
| Heidi Bjarnadóttir, Miðvágur | 10 |
| Rannvá Petersen, Argir | 10 |
| Jórun Hansen, Runavík | 10 |
| Jónvør Christiansen, Klaksvík | 11 |
| Birgit K. Eliasen, Fuglafjørður | 13 |

## Andlát & jarðarferðir

Harry Jacobsen, ættaður úr Sandavági, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum hóskvøldið 19. mai, 74 ára gamal.

Jarðarferðin var úr Kirkjugarðskapellinum mánadagin klokkan 13.

Evald Múller, Kvívík, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 20. mai, 83 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju týsdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Ingun Stokholm, fødd Lützen, Klaksvík, búsitandi í Thisted, andaðist í heiminum leygardagin 21. mai, 68 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Hurup kirkju mikudagin klokkan 13:30.

*Kelda: Útvarp Føroya*

†

Kunngjørt verður, at góði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Evald K. F. Müller**
Kvívík

andaðist 20. mai á Landssjúkrahúsinum, 83 ár gamal.

Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju týsdagin 24. mai kl. 14. Sungið verður úr Sálmabókini.

*Familjunnar vegna*
**Sigrid**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Birgit vilhelm**
Hoyvík

andaðist og varð jarðað.

Takk til tykkum á G1 og B7 fyri stóra umsorgan. Takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið. Takk til Kjartan Mørkøre og Marjun Bæk fyri tykkara góðu orð í kapellinum og í kirkjuni. Takk fyri minnisgávurnar til Hjartafelagið og takk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Jens Kári**
**Hanus, Anja og Rúni**
**Tummas**

Sosialurin -har tað hendir

**Dagurin**

**24. mai. Ester.** Drotningin, sum Esters bók í Gamla testamenti er skrivað um. Týdningurin av navninum er óvissur.